# Starvsfólk til Sandoyar Barnaverndartænastu

Eitt starv hjá Sandoyar Barnaverndartænastu er leyst at søkja til setan 15. novembur 2020, ella
eftir nærri avtalu.
Starvsbrøkurin er 0,45.
Sandoyar Barnaverndartænasta er eitt samstarv millum kommunurnar í Sandoynni og í Skúvoynni, og starvsstaðurin er í hølum á Skúlavegi 3, 230 Húsavík.
Barnaverndartænastan arbeiðir sambært lóg um barnavernd.

**Arbeiðsuppgávan umfatar m.a. :**
• Málsviðgerð og kanningar
• Samrøður við børn og vaksin
• Ráðgeving til børn og vaksin
• At fyrireika mál til viðgerð í Barnaverndarnevndini
• At seta í verk fyriskipanir og fylgja hesum upp
• Samskipa og samstarva tvørfakliga við aðrar myndugleikar
• Vera við í vaktarskipanini hjá Sandoyar Barnaverndartænastu

**Vit leita eftir starvsfelaga, ið :**
• Hevur miðallanga útbúgvin innan heilsu- ,almanna- ella skúlaøki og reina revsiváttan.
• Hevur góð samskiftis- og samstarvsevnir bæð í skrift og í talu
• Hevur góð evnir at seta seg inn í støðuna hjá familjuni, og hjálpa teimum út frá hesum
• Hevur góð evnir at samstarva og síggja loysnir
• Tolir at arbeiða undir trýsti og er fleksibul
• Hevur gott yvirlit og megnar at arbeiða sjálvstøðugt

**Vit bjóða:**
Eitt spennandi starv við nógvum avbjóðingum Supervisión

**Umsókn:**
Skrivlig umsókn saman við avriti av prógvum, viðmælum og cv skal sendast til
Sandoyar Barnaverndartænastu
Skúlavegur 3
230 Húsavík
í seinasta lagi 22. oktobur 2020 klokkan 12.00

**Løn og setanarviðurskifti:**
Løn og setanarviðurskifti eru eftir sáttmála millum Starvsmannafelagið og Kommunala arbeiðsgevarafelagið.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Kristinu J á Reynatúgvu, leiðara á telefon 288024.